## Hiddink bíðar ikki eftir Liverpool

Ringa gongdin hjá Liverpool hetta kappingarárið hevur havt við sær, at nógvar gitingar hava verið um lagnuna hjá Rafael Benitez. Ein afturvendandi søga er, at fráfarandi russiski landsliðsvenjarin, Guus Hiddink, skal taka yvir eftir Benitez í Liverpool. Men sambært fótbóltssambandinum hjá Turkalandi, so verður hetta av ongum. Teir siga, at Guus Hiddink hevur játtað at gerast venjari hjá Turkalandi komandi tvey árini. Guss Hiddink er 63-ára gamal og úr Hollandi. Hann hevur verið landsliðsvenjari hjá millum annað Suður Korea, Australia og Russlandi. Av øðrum liðum kunnu nevnast Real Madrid, PSV, Valencia, og í fjør var hann fyribils venjari hjá Chelsea í eitt tíðarskeið.



## NM byrjar í dag

Í dag byrjar NM í talvi fyri ung, sum hesuferð verður telvað í Vasterås í Svøríki. Føroyski hópurin er komin fram í øllum góðum og klárt er at byrja NM-orrustuna 2010. Í kappingini um Norðurlendsku meistaraheitini, luttaka 10 ungdómar úr Føroyum, Danmark, Svøríki, Íslandi, Finlandi og Noregi. Kappast verður í 5 aldursbólkum: U20, U16, U14, U12 og U10. Føroysku umboðini í kappingini eru Rógvi Egilstoft Nielsen (FM), Sandavágur, Margar Berg, Tórshavn, Heiðrikur Tindskarð Jacobsen (FM), Tórshavn, Karl Marius Dahl, Kollafjørður, Einar Gregersen (FM) og Heðin Gregersen, brøður úr Klaksvík, Høgni Egilstoft Nielsen (FM), Sandavágur, Aldred Olsen, Vestmanna, Eli W. Finnsson, (FM), Tórshavn, Janus Skaale, Klaksvík

# Ternan á flog á Toftum

**Á stovnandi aðalfundi á Svangaskarði í gjárkvøldið gjørdist nýggja flogbóltsfelagið Ternan veruleiki. Sostatt fer B68 Flogbóltur í søguna, men í staðin er komið eitt felag, sum ætlandi skal vera fyri allan Skálafjørðin**




Hilmar Jan Hansen

Flogbóltur er ikki nakað ókent spæl á Toftum, og mitt í 90-unum vunnu manslið hjá B68 2. deild eina ferð og 3. deild tvær ferðir. Síðani kom steðgur í, men í fjør fóru toftafólk aftur undir flogbólt, og í løtuni er besta kvinnuliðið heilt frammi í oddanum í næstbestu deildini, har bara eitt sett skilir tað frá oddasessinum, ið Fleyr hevur í løtuni.

Góða gongdin, ið fevnir um átta lið í FM-kappingunum, umframt fleiri lið, ið javnan spæla kappingar, hevur eisini skundað undir, at flogbólturin á Toftum ynskti at fáa meira skipað viðurskifti og – ikki minst – sítt egna felag.

Higartil hevur verið spælt undir navninum B68 Flogbóltur, men annars hevur talan verið um sjálvstøðugt virksemi, ið hevur havt nýggju fimleikarhøllina í Tofta skúla sum heimavøll. Har eru góðar umstøður til flogbólt, tí so mikið rúmsátt er, at sjálvt við 100-150 áskoðarum er gott pláss fyri sjálvum flogbóltinum á gólvinum, bæði úti í síðunum og við endarnar. Hartil er høgt til lofts, so høllin er sum gjørd til flogbólt.

### Ternan er navnið

Í gjárkvøldið var so avgerandi stigið tikið og nýtt flogbóltsfelag sett á stovn, tá kallað var inn til aðalfund í ítróttarhúsinum á Svangaskarði. Eini 30 fólk møttu á fundinum, ið fekk valt nevnd og givið felagnum navnið, ið gjørdist Ternan.

– Hetta er eitt navn, ið ikki er ókent í ítróttarhøpi á Toftum, tí her er ein kappróðrarbátur við sama navni, sigur Hermann Jacobsen, sum er ein av eldsálunum aftan fyri flogbóltin á Toftum.

Hann ætlaði sær ikki í nevndina, men endaði kortini við at gerast tiltakslimur. Formaður í fyrstu nevndini í Ternuni er Alex Troleis, meðan Katrin Olsen er næstformaður og Helen Højgaard Jacobsen er skrivari.

– Lógir vóru longu undan stovnandi aðalfundinum gjørdar fyri nýggja felagið, so tað nógva av tíðini fór til at finna navnið. Uppskotini trutu ikki, og fundarfólkið slapp at velja millum uppskotini, og tá vóru flest fyri, at felagið skal eita Ternan. Enn hava vit ikki nakað búmerki, men nú vit hava fingið navnið, kunnu vit fara at arbeiða víðari við tí, sigur Hermann.



Nevndin í nýggja flogbóltsfelagnum, Ternuni. Frá vinstru: Hermann Jacobsen, tiltakslimur, Katrin Olsen, næstformaður, Helen Højgaard Jacobsen, skrivari, og Alex Troleis, formaður
Mynd: Doris Djurhuus

### Fyri allan fjørðin

Ternan er sostatt tað nýggjasta av tilsamans 10 feløgum kring landið, sum eru við í vaksnamannakappingunum undir Flogbóltssambandinum, og hetta er flogbóltsfelag burturav.

– At vit fáa okkara egna felag til flogbóltin, er gott, tí vit hava longu frammanundan arbeitt sum eitt sjálvstøðugt felag. Navnið hava vit lánt frá B68, men annars hava vit tikið okkum av øllum sjálvi, sigur Hermann Jacobsen.

– Vit vilja eisini fegin hava, at felagið røkkur út um Nes kommunu og kann fevna um øll á Skálafjørðinum, sum hava hug at spæla flogbólt. Fleiri av teimum, sum longu eru við, eru eisini úr øðrum bygdum við fjørðin, og eitt nú er onkur spælari úr Fuglafirði við hjá kvinnunum.

Sum nevnt, liggur besta kvinnuliðið hjá Ternuni væl fyri í kappingini í 1. deild, so ikki er óhugsandi, at fólk longu næsta ár kunnu venja seg við at hoyra navnið umrøtt javnan, um kvinnurnar altso megna at flyta upp í Eik-liguna.



Eini 30 fólk møttu á stovnandi aðalfundinum hjá Ternuni, sum var í ítróttarhúsinum á Svangaskarði í gjárkvøldið
Mynd: Hermann Jacobsen

# Formaðurin fegnast



– Ikki minst er Ternan spennandi, tí besta kvinnuliðið hjá felagnum liggur framvið at koma upp í Eik-liguna, sigur formaðurin í Flogbóltssambandinum, Magnus Tausen
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

**Flogbóltssambandið tekur væl ímóti nýggja flogbóltsfelagnum, Ternuni, og millum annað sær Magnus Tausen, formaður, fram til at síggja besta kvinnuliðið hjá felagnum í Eik-liguni**

– Í praksis merkir hetta, at flogbólturin hjá B68 fær sín egna samleika, og tí taka vit øgiliga væl ímóti. Formliga skal Ternan góðkennast á aðalfundi í Flogbóltssambandinum, men eg ivist ikki í, at felagið eisini har fer at fáa allarbestu móttøku, sigur Magnus Tausen, formaður í Flogbóltssambandinum.

– Ikki minst er hetta spennandi, tí besta kvinnuliðið hjá felagnum liggur framvið at koma upp í Eik-liguna. Tað krevur sjálvandi nakrar broytingar, sum eg tó eri vísur í, at hini feløgini eru sinnað at fremja, so tað eisini verður pláss fyri Ternuni í fremstu røð.

Broytingarnar, sipað verður til, er talið á liðum í Eik-liguni hjá kvinnum, sum nú er sjey. Skulu liðini verða átta, so krevst ein lógarteknisk samtykt, umframt at tað kemur at broyta kappingarskipanina, at besta kvinnudeildin verður víðkað við einum liði.

– Tað kemur helst at merkja, at umførini ikki verða líka nógv, sum tey hava verið. Men fyrst og fremst kemur tað at merkja, at vit koma at hava størstu kvinnudeildina í Føroyum yvirhøvur, og tí eru vit ótrúliga errin av, sigur Magnus Tausen, sum eisini sær fyri sær, at Eik-ligan hjá monnum kann gerast størri.

– Í løtuni sær út til, at TB skjótt kann vera til reiðar at koma upp, og eg veit, at mansliðini høvdu tikið væl ímóti tí. Verður farið úr fýra upp í fimm lið, munar tað væl, tí sum nú er, er besta mansdeildin í so lítil. Eg vóni eisini, at menninir hjá TB eru sinnaðir at koma upp, so skjótt sum teir síggja seg førar fyri tí, og okkara partur skal so í øllum førum ikki liggja eftir.

**hil**